FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. februar 2026
J. nr.: 26/04029

Svar uppá fyrispurning nr. 52-087/2025 frá Eyðdis Hartmann Niclasen, løgtingskvinnu, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um inntøkur av vaksandi feraðvinnu.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar samlaðar inntøkur eru komnar í landskassan frá vinnurekandi við færri enn 15 starvsfólkum seinastu 5 árini, og hvussu stórur partur av hesum stavar frá smærri vinnurekandi í ferðavinnuni, so vítt gjørligt sundurgreinað á skattir, avgjøld og onnur gjøld?
2. Hvør hevur menningin av inntøkum frá ferðavinnuni verið seinastu 5 árini, og hvørja ávirkan metir landsstýriskvinnan, at lógin um burðardygga ferðavinnu hevur havt í hesum sambandi?

Svar til fyrispurning nr. 1 og 2:
Tað er ikki møguligt at gera eina uppgerð av, hvørjar samlaðar inntøkur eru komnar í landskassan frá vinnurekandi við færri enn 15 starvsfólkum – ella hvussu stórur partur av hesum stavar frá smáum vinnurekandi í ferðavinnuni – sundurgreinað á skattir, avgjøld og onnur gjøld.

Verandi hagtals- og skatta-/gjaldsdátur eru ikki raðfestar og skipaðar á ein hátt, sum loyvir eini álítandi sundurgreining eftir starvsfólkatali, vinnugrein og skatta-/gjaldsslagi samstundis. Hetta er sostatt ein uppgerð, sum hvørki Hagstova Føroya ella TAKS kann veita við verandi tilfeingi.

Hagstova Føroya er í gongd við at menna hagtalsøkið um ferðavinnu, og tað er við støði í teimum verandi keldunum, at úrvald tøl verða lýst í talvunum í hjálagda fylgiskjali.

Ferðavinnan er ein tvørgangandi vinna, har virksemi og virðisøking spjaðir seg um fleiri vinnugreinar (eitt nú gisting, matstovur, flutning, upplivingar/undirhald og smásølur). Tølini í talvunum lýsa virksemi ísv. innkomandi ferðavinnu, og fevna um sølu og tænastuveitingar til ferðafólk, sum búgva uttanlands.

Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu hevur einans virkað í knapt tvey ár (síðan mai/juni 2024), og tað er tí trupult at siga, hvørja ávirkan lógin hevur havt á ferðavinnu í Føroyum og inntøkur frá henni.

Tinganes, 24. februar 2026

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Fylgiskjal: Úrvald tøl fyri ferðavinnuna

Orðalýsingar

Innkomandi ferðavinna: Innkomandi ferðavinna fevnir um sølu- og tænastuveitingar til ferðafólk, sum búgva uttanlands.

***Um hagtølini*:** Hagtølini hava støði í eini spurnakanning og roknskapartilfari hjá feløgum, ið hava við innkomandi ferðavinnu at gera. Út frá hesum keldum er roknað og mett um sølu, bruttovirðisøking og ársverk.

Bruttovirðisøking frá innkomandi ferðavinnu
Estimerað fyri árini 2021 til 2024

	2021	2022	2023	2024
1.000 krónur				
Bruttovirðisøking frá vitjandi ferðafólki í alt	**197.967**	**318.459**	**334.415**	**384.967**
1 Gisting til vitjandi	72.204	94.610	98.028	119.367
2 Virksemi innan tænastuveiting við mat- og drykkjuvørum	12.206	38.847	36.470	41.096
3 Ferðafólkaflutningur á vegi	4.624	7.395	7.675	9.517
4 Ferðafólkaflutningur sjóvegis	22.956	44.045	51.070	56.599
5 Ferðafólkaflutningur loftvegis	56.772	84.175	90.775	94.162
6 Leiga av flutningsútgerð	10.163	14.473	11.534	13.756
7 Ferðaskrivstovur og annað bíleggingartænastuvirksemi	6.515	16.745	16.418	27.557
8 Mentanarligt virksemi	1.027	989	1.339	1.539
9 Ítróttar- og frítíðarvirksemi	1.062	1.660	1.317	1.428
10 Smáhandil við landsserstøkum ferðavinnueyðkendum vørum	2.890	3.867	6.235	5.206
11 Annað nýtsluvirksemi	7.548	11.654	13.554	14.739
Bruttovirðisøking samanlagt smb. tjóðarroknskapi	**20.355.306**	**22.553.191**	**24.238.933**	**24.643.626**
Prosent				
Bruttovirðisøking vitjandi ferðafólk ímt til búskapin í alt	**0,97%**	**1,41%**	**1,38%**	**1,56%**

Kelda: Hagstova Føroya

Bruttovirðisøking frá innkomandi ferðavinnu
Estimerað fyri árini 2021 til 2024

	2021	2022	2023	2024
1.000 krónur				
Bruttovirðisøking frá vitjandi ferðafólki í alt	**197.967**	**318.459**	**334.415**	**384.967**
Feløg við færri enn 15 ársverkum	50.725	80.433	88.826	107.119
Feløg við 15 ella fleiri ársverkum	147.242	238.026	245.589	277.848
Bruttovirðisøking samanlagt smb. tjóðarroknskapi	**20.355.306**	**22.553.191**	**24.238.933**	**24.643.626**
Prosent				
Bruttovirðisøking vitjandi ferðafólk ímt til búskapin í alt	**0,97%**	**1,41%**	**1,38%**	**1,56%**
Feløg við færri enn 15 ársverkum	0,25%	0,36%	0,37%	0,43%
Feløg við 15 ella fleiri ársverkum	0,72%	1,06%	1,01%	1,13%

Kelda: Hagstova Føroya

Søla frá innkomandi ferðavinnu

Estimerað fyri árini 2021 til 2024 og lýst í mun til samlaða útflutningsvirðið

	2021	2022	2023	2024
1.000 krónur				
Umsetningur frá innkomandi ferðavinnu í alt	**592.060**	**996.056**	**1.102.811**	**1.143.388**
1 Gisting til vitjandi	127.907	194.531	209.853	247.113
2 Virksemi innan tænastuveiting við mat- og drykkjuvørum	26.553	67.691	72.898	92.240
3 Ferðafólkaflutningur á vegi	9.783	14.824	16.315	19.277
4 Ferðafólkaflutningur sjóvegis	157.714	246.680	247.698	265.015
5 Ferðafólkaflutningur loftvegis	155.696	265.220	318.016	265.063
6 Leiga av flutningsútgerð	34.470	52.701	52.589	57.678
7 Ferðaskrivstovur og annað bíleggingartænastuvirksemi	27.489	84.836	109.136	116.517
8 Mentanarligt virksemi	2.468	2.657	3.400	3.921
9 Ítróttar- og frítíðarvirksemi	3.868	4.520	3.263	4.105
10 Smáhandil við landsserstøkum ferðavinnueyðkendum vørum	6.051	9.785	13.208	14.615
11 Annað nýtsluvirksemi	40.061	52.609	56.433	57.843
Útflutningur av vørum og tænastum	**12.090.424**	**15.700.803**	**15.538.103**	**15.244.618**
Umsetningur frá ferðafólki ímt til útflutning í alt *	**4,9%**	**6,3%**	**7,1%**	**7,5%**

Viðm: * Umsetningurin (søluvirði) við sølu av vørum og tænastum til vitjandi ferðafólk er ein deilmongd av ferðajavnanum í gjaldsjavnanum og kann tískil berast saman við samlaða útflutningsvirðið av vørum og tænastum

Kelda: Hagstova Føroya

Tal av feløgum, ið hava viðskifti við útlendsk ferðafólk

Estimerað fyri árini 2021 til 2024

	2021	2022	2023	2024
Tal av feløgum				
Feløg tilsamans	**292**	**306**	**312**	**298**
Feløg við færri enn 15 ársverkum	260	273	279	271
Feløg við 15 ella fleiri ársverkum	32	33	33	27

Kelda: Hagstova Føroya